# Ein listarlig uppliving í Gamla Turkihúsinum í Leirvík



Tað er týskvøld, klokkan fer at nærkast hálvgum níggju, og fólk byrja so smátt at sessast inni í lítla snotiliga listaskálanum hjá Osmundi. Væl roynist rúmið, úti við 60 fólk fáa sitið og brátt er nærum fullsett, stuttligt at so mong kunnu savnast at lurta eftir kamartónleiki í so lítlari bygd, eisini tá hugsað verður um at tvey onnur tiltøk eru eisini í kvøld — ungdómsmøti og eldrasamkoma. Gamaní onkur fuglfirðingur og enntá einir tveir havnarmenn hava eisini funnið sær veg til Leirvíkar í kvøld at njóta listina. Vit sessast, og meðan vit bíða, njóta vit vøkru málningarnar, teir flestu eftir Jóannes Kristiansen og Sámal Toftenæs, lýsandi Leirvík fyrr og nú í skiftandi ljós- og litspæli, og tað er ikki sørt at hugin eina løtu leitar aftur í barnaár.

Nú koma tær báðar Monika Stauss Joensen og Helene Ringgenberg inn og nú trínur mið-europeisk mentan, tá hon er best, inn ímillum fjøllini og húsini í Leirvík Tað er Sonata fyri cembalo og violin í h-moll eftir Johann Sebastian Bach vit hoyra. Góði gamli Jóhan - og júst á tveimum teim vanligastu ljóðførum á hansara døgum. Hann gongur so spelkin í Leirvíkstúni og fegnast um ljósið og litirnar_ fáir tónasmiðir eru so "universellir" sum hann, og sjálvt um vit onga løtu ivast í nær í tíðini tónleikur hansara varð til, so kann hann altíð og allastaðni nýtast og njótast…

Honum á baki kemur Georg Friedrich Händel við Suitu í d-moll fyri cembalo, og sjálvt um hansara tónamál er líka kent, so verða vit nú spakuliga drigin úr Leirvíkstúni oman í glæstriborgir miðaldarinnar — í Hannover? í London? ella Dublin? — Suitan er samansett av fýra miðaldardansum:. "Allmand" ella "Allemande" er ein seinur hábærsligur dansur við uppruna í Týsklandi. "Corrant" ella "Currante" er ein franskur dansur, eisini seinur, men tónleikurin er krevjandi við nógvum "forsiringum", so Helene sleppur rættiliga at sýna sítt kynstur her. So kemur tann vakra "Sarabandan" við tí kenda lagnum og síðst kemur tann lívligi "Jigg" ella "Gigue"

Hetta var alt í alt ein góð løta við góðum barokktónleiki, men nú koma vit spakuliga aftur í Leirvíkstún, tí nú stendur okkara egna Monika aftur á gólvinum við síni fiól og greiðir frá næsta stykkinum: Partita fyri solo violin eftir Frederic Balazs. Hann er føddur í Budapest í 1919, men hevur búð mesta partin av lívi sínum í USA. Hann hevur verið í Føroyum og spælt m.a. saman við Moniku og hetta stykkið hevur hann skrivað til hennara. "A Noiseless Patient Spider" eitur fyrri satsurin. "Ein kvirrur, tolin eiturkoppur" Nú fara vit niður so at siga niður í mikrokosmos — heimin hjá lítla eiturkoppinum og tónleikurin lýsir, hvussu hann tolin spinnur sína nót, hvussu hann klívur sín tráð og bindur sínar knútar . . . . Seinni satsurin eitur "Parade" — ein festlig amerisk skrúðgonga við ymiskum tónleiki, fremst gongur jazzurin, so kemur countrytónleikurin, so sigoynarnir, magyararnir, marsjorkestrið o.s.fr.

So skiftir myndin aftur, Helene spælir "Suite de Chansons populaires" - suita við kendum sangum — eftir landsmannin og vinmannin Pierre-André Bovey og tað er stuttligt at hoyra at núlivandi tónaskald eisini við hesum aldargamla ljóðfari kunnu geva so góðar lýsingar og tónamálarí sum henda suita: "Clarillon de Vendome" — kirkjuklokkur í Vendome, "Petite camuson" — lítil smátta, "Rossignolet des bois" — náttargalurin í skóginum, "Pastourelle" — um seyð(!)

Vit enda í Spania. Malaguena op.21,1 fyri violin og cembalo eftir Pablo de Sarasate. Vit hoyra tær lívligu sponsku rútmurnar og tey yndisligu, kenslubornu løgini, og tað gongur ein góð løta, áðrenn vit koma aftur úr Spania til Leirvíkar - í túni hjá Ragnhild og Sigrid og síggja tey kendu fjøllini aftur í penslastroki teirra Jóannesar og Sámals. Nú bjóða tær okkum kaffi og heimabakaðar vaflur og meðan vit njóta hetta, ganga vit og skoða listverkini betur, meðan tónleikaferðin niðri á europeiska meginlandinum sodnar spakuliga . . . . eitt sera væleydnað mentunnartiltak er at enda, tøkk fái tit sum gjørdu hetta møguligt. Listaskálin kann væl nýtast til slík tiltøk!

Dánjal Eysturstein

## Viðmerkingar

# Hetta vil Tjóðveldisflokkurin!



Tjóðveldisflokkurin hevur stillað 10 valevni upp til býráðsvalið í Klaksvík. Vit hava fingið ein góðan lista, har bæði ung og eldri, kvinnur og menn, trygt kunnu seta sín kross. Ein listi við 10 góðum valevnum gevur 10 góð boð uppá ein komandi borgarstjóra.

Í farna valskeiði hevur flokkurin sitið í samgongu, og eftir tey ringu árini frá '92 til '96 hevur borið til at litið frameftir aftur. Neyðugt hevur verið at ført ein varnan fíggjarpolitikk, men umboð Tjóðveldisfloksins í býráðnum hava verið við til at loyst nógv mál og sett sjøtul á onnur. Nevnast kann m.a. útbyggingin av vatnveitingini, at ferð er komin á málið um barnaansingina, umbyggingin av skúlanum er komin ávegis, gongd er komin á virksemi á ídnaðøkinum á Borðoyarvík, og betraði viðurskifti eru á eitt nú bókasavninum. Vit eru farin inn í núverandi loysn av kommunuskuldini, tí vit meta hetta vera til besta gagn fyri Klaksvíkar kommunu.

Nógv átroðkandi mál skulu loysast í komandi valskeiði. Eyðsæð er, at vit framvegis mugu føra ein varnan fíggjarpolitikk. Við núverandi gongd verða fimm ár, áðrenn skuldin er komin niður um eina álíkning. Avgerandi spurningurin fyri okkum er tí, hvussu vit undir hesum fortreytum styrkja kommunu okkara. Hetta merkir: at taka fíggjarliga ábyrgd, og samstundis virka fyri tí trivnaði, sum er grundarlagið fyri okkara fíggjarkarmi. Vit hava sett okkum fyri at fremja ein skipaðan politikk innan vinnulívs-, sosial- og mentunnarøkið. Hesin skipaði politikkur hevur trý høvuðseyðkenni, sum miðast skulu móti komandi valskeið:

- at kommunan fremur eina miðvísa raðfesting av teimum málum, ið loysast skulu.
- at kommunan virkar sum ígongdsetari og stuðul til at menna tað menniskjaliga tilfeingið, sum vit hava her á staðnum, umframt at fáa onnur at koma til.
- at kommunan tekur størri ábyrgd fyri partum av sosial- og mentunnarpolitikkinum, sum í dag verður fyrisitin av landsmyndugleikunum.

Sum valevni hava vit sjálvsagt okkara serligu áhugamál, men hetta eru tær almennu linjurnar hjá flokkinum. Ein krossur fyri einhvønn av okkum er tí ein krossur til frama fyri einum miðvísum politikki, ið vil virka fyri eini virknari kommunu.

Valevni Tjóðveldisfloksins til býráðsvalið 2000
Hanus T. Bærentsen
Karsten Hansen
Torkil Heinesen
Jórun Høgnesen
Anna Løve Jacobsen
Steinbjørn Jacobsen
Hergerð Joensen
Jákup Pauli Johannesen
Rani Nolsøe
Jón Harald Poulsen






*Lesið eisini Ítróttasosialin á alnetinum*

***www.sosialurin.fo***

# Talvkongurin Grischuk




*Ein fegin Alexander Grischuk fær her handað stóra kekkin frá formanninum í Talvsambandinum, Rana Nolsøe, og landsstýrismanninum í mentamálum, Torbjørn Jacobsen*

*Tann bert 16 ára gamli russarin Alexander Grischuk vann 3rd Tórshavn International. Javnir í stigum varð ukrainarin Ruslan Ponomariov, sum tó hevdi færri mótstøðustig enn Grischuk og endaði sostatt á øðrum plássi. Fremsti føroyingur varð John Rødgaard*

Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Í frálikum umstøðum hava tredivu telvarar í átta dagar húsast í stásiliga Norðurlandahúsinum við tí fyri eyga at stríðast á talvborðunum. Hvør dagur hevur verið ein langur og spennandi arbeiðsdagur fyrst við fyrireiking og síðani at telva teir vanligu 4-5 tímarnar. Fyri okkum telvarar hevur tað verið eitt satt upplivilsi at verið ein partur av tilíkari kapping.

3rd Tórshavn International varð ein succes, heili tólvtúsind áskoðarar hava eygleitt kappingina á alnetinum, www.faroechess.-com, og kappingin hevur gjørt Føroyar meira sjónligar á heimskortinum. Við samstarvi við Føroya Sparikassa, Føroya Shell, Føroya Tele, Tórshavnar Býráð og Norðurlandahúsið megnaði Talvsamband Føroyar at skipað fyri hesari stórkapping.

### Tvídysturin mikli

3rd Tórshavn International varð í roynd og veru ein tvídystur ímillum Grischuk og Ponomariov. Eingin kundi hótta teir, og endaðu teir eisini heili hálvtannað stig framanfyri næsta telvaran sum varð russiskiføddi írin Alexander Baburin. Grischuk vann síni fyrstu seks talv og trý tey seinastu leikti hann javnt, meðan Ponomariov vann síni síðstu trý talv. Einasta tapið hjá Ponomariov varð just ímóti Grischuk.

Hesir báðir ungi menninir, Ponomariov bleiv seytjan ár undir kappingini, vísti telving í heimsklassa. Torført er at siga, hvør av teimum er tann betri telvarin, men Grischuk hevði sterkari mótstøðu og vann eisini á Ponomariov og tí er hann rætti vinnarin. Fyrsta virðislønin Grischuk ognaði sær, var heili 40.000 krónur.

Írin, Baburin, hevði somuleiðis eina góða kapping við bert einum tapi, og endaði einsamallur á triðja plássi.

Yngsti telvarin í kappingini, tann trettan ára gamli Teymur Radjabov, kláraði seg væl og ognaði særi eitt tólvta plássi. Hann prógvaði at hann megnar uppgávur ímóti stórmeistarum, og verður uttan iva skjótt stórmeistari sjálvur.

### Einki føroyskt gjøgnumbrot

Eingin av teimum ellivu føroysku telvarnum fingu altjóða gjøgnumbrot á hesum sinni. Vit mugu bara ásanna at størri arbeiði krevst at nærkast útlendingunum og teirra støði. Bert tí einu ferðina í kappingini eydnaðist tað ein av okkum at basa ein altjóða meistara, og tað var heldur soltið. Vit fingu nakrir javnleikir, men vórðu vit verið meira neyvir í avgerandi løtunum vunnu vit fleiri av hesum javnleikum.

Teir flestu av okkum høvdu eina minni góða kapping, og teir einastu ið kunna vera nøgdir við úrslit teirra eru Torbjørn Thomsen, Martin Poulsen og Olaf Berg. Hesin seinasti klatraði væl upp eftir ratingstiganum. Til dømis leikti hann javnleik ímóti Flóvini í seinasta umfarinum.

Landsliðstelvarnir John Rødgaard, John Arni Nilssen, Flóvin Tór Næs og Ólavur Simonsen telvaðu allir sera óstøðugt. John varð einasti føroyingur ið fekk 50%, men øll hansara stig fekk hann ímóti føroyingum og kann hann tí ikki vera heilt nøgdur við sítt avrik. Hann vann tó eitt gott talv ímóti Flóvini.

Sjálvt um føroysku avrikini ikki vórðu av teimum heilt bestu, so varð hetta ein góð upphiting hjá landsliðstelvarnum okkara til OL, sum byrjar seinast í hesum mánaði í Istanbul.

Mentamálaráharrin Torbjørn Jacobsen tók sær av steypahandini og helt hann eina mergjaða røðu, har hann til dømis sipaði til at talv er ein partur av mentan okkara, og at hesin ítróttur hoyrdi heima í fólkaskúlanum.

*Toppurin*

| | |
|---|---|
| 1. A. Grischuk | 7,5 stig av 9 |
| 2. R. Ponomariov | 7,5 |
| 3. A. Baburin | 6 |
| 4. S. Conquest | 5,5 |

*Føroysku úrslitini*

| | |
|---|---|
| John Rødgaard | 4,5 |
| John Arni Nilssen | 4 |
| Torbjørn Thomsen | 4 |
| Flóvin Tór Næs | 4 |
| Heini Danielsen | 3,5 |
| Martin Poulsen | 3,5 |
| Terji Petersen | 3,5 |
| Ólavur Simonsen | 3,5 |
| Olaf Berg | 3,5 |
| C. E. N. Samuelsen | 3 |
| Herluf Hansen | 2,5 |

Inni á www.faroechess.com eru hópin av myndum frá hvørjum umfari, og somuleiðis øllum telvarnum.

## Talvini hesa vikuna

Talv frá nígginda og seinasta umfari. Grischuk kundi við javnleiki ognað sær fyrsta pláss, og sjálvt um hann varð trýstur av svianum, Tiger, megnaði hann javnleik. Hjá Ponomariovi varð bara eitt at gera, nevnliga at vinna.

Tiger Hillarp-Persson (2549) — Alexander Grischuk (2606)
3rd Tórshavn International Tórshavn (9), 14.10.2000
1.g3 d5 2.Bg2 Nf6 3.d3 g6 4.Nf3 Bg7 5.0-0 0-0 6.Nbd2 Nc6 7.e4 e5 8.b3 a5 9.a3 Be6 10.h3 h6 11.Bb2 d4 12.Qe2 Nd7 13.Nh2 Nc5 14.h4 h5 15.Rae1 Qd7 16.Bc1 Rae8 17.Kh1 Qd8 18.Rg1 Kh8 19.Bf3 f5 20.exf5 Rxf5 21.Ne4 Nxe4 22.Bxe4 Bd5 23.g4 hxg4 24.Qxg4 Bxe4+ 25.dxe4 Rh5 26.Qxg6 Rh7 27.Bg5 Qd7 28.Bf6 Rf8 29.Bxg7+ Qxg7 30.Qxg7+ Rxg7 31.Rxg7 Kxg7 32.Kg2 Ne7 33.Ng4 Ng6 34.Kg3 Rh8 35.b4 axb4 36.axb4 Rxh4 37.Ra1 Rh8 38.Ra7 Rb8 39.Ra5 Re8 40.Ra7 Rb8 41.Ra5 Re8 42.Rb5 b6 43.Rd5 Kf7 44.f4 exf4+ 45.Kf3 Rh8 46.Rd7+ Ke6 47.Rxc7 Rh3+ 48.Kf2 Ne5 remis

Hannes Stefansson (2557) — Ruslan Ponomariov (2630)
3rd Tórshavn International Tórshavn (9), 14.10.2000
1.e4 g6 2.d4 Bg7 3.c4 d6 4.Nc3 Nf6 5.f3 0-0 6.Bg5 a6 7.Qd2 c5 8.d5 b5 9.cxb5 Qa5 10.a4 Nbd7 11.Ra3 Qb4 12.Nh3 Ne5 13.Nf2 Bd7 14.b6 Qxb6 15.f4 Neg4 16.Nfd1 h6 17.Bh4 g5 18.fxg5 hxg5 19.Bxg5 Nh7 20.Bf4 f5 21.Bd3 c4 22.Bc2 fxe4 23.Bxe4 Rf7 24.h3 Ne5 25.Be3 Qb7 26.Nf2 Rb8 27.Ra2 Nf6 28.Bc2 Nh5 29.0-0 Ng3 30.Re1 Rbf8 31.Nce4 Nf5 32.Bb1 Nxe3 33.Qxe3 Qxd5 34.Ra3 Bc6 35.Rd1 Nd3 36.Bxd3 cxd3 37.Raxd3 Qe5 38.R1d2 Bxe4 0-1